

Peter Hermanrud, greinari hjá Swedbank. Mynd: Swedbank

# Greinari: Oljuprísurin kann lækka til 30 dollarar áðrenn vend kemur í

**Jógvan Hugo Gardar**

07.01.2015 - 11:36

Oljan.fo

Norski oljugreinarin hjá Swedbank, Peter Hermanrud, segði á vinnustevnuni í Stavanger í gjár, at oljuprísurin kemur at hækka til umleið 90 dollarar í summar, men nógv kann henda áðrenn.

- Vit kunnu fáa ein oljuprís sum liggur um 30 dollarar. Tað er als ikki óhugsandi, men tað er meir hugsandi at oljuprísurin kemur at liggja ímillum 40 og 50 dollarar, segði Hermanrud.

Hann meinar at sjálvt um oljuprísurin er nógv lækkaður í vetur, so kann príslækkingin halda fram eina tíð afturat. Men Hermanrud sigur eisini at nú eru fleiri oljulond moyr, og

helst gongur ikki lang tíð áðrenn Saudi Arabia fær nøkur fleiri oljulond við sær og avmarkar oljuframleiðsluna, so prísurin hækkar aftur. Hansara boð er at oljuframleiðlan lækkar í juni, og at tað fær oljuprísin upp móti eini 90 dollarum fyri fatið í summar.